

# Foreldrasamstarvsskeið

í Familjufyrisitingini

Familjufyrisitingin bjóðar foreldrum, ið ikki liva saman, á skeið um foreldrasamstarv. Tað er ókeypis fyri foreldur at luttaka og øll foreldur, ið ikki liva saman, kunnu tekna seg.

Alt skeiðið hevur støði í tí, sum vit vita hevur týdning fyri trivnað og tryggleika hjá børnum, tá ið foreldur ikki liva saman.

Sjóneyka verður sett á hesi trý øki:

1) Foreldrasamstarvið – hvussu samstarv og samskifti um børnini verður styrkt.
2) Børnini – hvussu børn verða væl stuðlað undir og eftir skilnaðin.
3) Egin tilgongd – hvussu foreldur fáa tikið sær væl av sær sjálvum undir og eftir samlívsslit.





Finn tilmeldingarskjal og meira kunning um foreldrasamstarvsskeiðið á heimasíðu okkara famf.fo/foreldrasamstarvsskeid.

Familjufyrisitingin hevur eisini samrøðubólkar til børn og ung, hvørs foreldur ikki liva saman. Les meira um samrøðubólkar á famf.fo/samrodubolkar.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Familjufyrisitingina.

FAMILJUFYRISITINGIN
Dr. Jakobsens gøta 21 | FO-100 Tórshavn | Tel. 20 22 24 | famf@famf.fo | famf.fo